# VEÐRIÐ Í HARALDSSUNDI



# MARS 2023

# VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Haraldssund ........ 3
Veðrið í bygdini ........ 4
Norðan ........ 6
Landnyrðingur norðan ........ 6
Landnyrðingur ........ 8
Landnyrðingur eystan ........ 8
Eystan ........ 9
Landsynningur eystan ........ 10
Landsynningur ........ 10
Landsynningur sunnan ........ 11
Sunnan ........ 11
Útsynningur sunnan ........ 12
Útsynningur ........ 12
Útsynningur vestan ........ 13
Vestan ........ 14
Útnyrðingur vestan ........ 15
Útnyrðingur ........ 15
Útnyrðingur norðan ........ 16
Spurningar og svar ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

**<u>Dagfesting</u>**: 17. mars 2023

**<u>Staður</u>**: Faktorsvegur 14 – 700 Klaksvík (*Veðurstova Føroya*)

**<u>Heimildarfólk:</u>** Jákup Jacobsen & Jógvan Pauli í Kongsstovu

**<u>Viðtal við</u>**: Hanus Kjølbro

# Haraldssund

Haraldssund er bygd sunnarlaga á eystursíðuni á Kunoynni við sundið, sum er ímillum Borðoy og Kunoy, eisni nevnt Haraldssund.

Kunoyggin er høg – í miðal tann hægsta í Føroyum. Fjøllini á Kunoynni eru sum ein fjallarøð. Sunnast er Suðuri á Nakki (*703m*), so Galvskorafjall (*768m*) beint vestan fyri bygdina og eftir tað Urðafjall (*817m*) og Middagsfjall (*805m*).

Á Borðoynni hinumegin sundið, sum bert er 400 til 500 metrar breitt, eru fjøll, sum hava ávirkan á veðrið í bygdini. Vindurin á ættunum úr útsynningi upp í útnyrðing slær ímóti fjøllum á Borðoynni og kemur yvir um sundið aftur.

Fjøllini eru í høvuðsheitum Snæfelli (*644m*) og Lokkin (*754m*).




*Mynd 1: Kort av Kunoy. Bygdin Haraldssund liggur út ímóti sundinum, Haraldssundi. Har bygdin er, er sundið smalt – um 400 til 500 metrar.*



*Mynd 2: Haraldssund avmyndað í útnyrðing norðan. Ættirnar norður og suður ígjøgnum sundið eru góðar, vindurin fer ótarnaður eftir sundini, røkkur ikki inn í bygdina. Fjøllini á Kunoynni verja ímóti ættunum úr útnyrðingi vestri niður í útsynning sunnan, men er nakað av vindi, slær hann aftur úr fjøllunum á Borðoynni og kemur yvirumaftur. Fjøllini á Borðoynni verja ímóti ættunum úr landnyrðingi niður í landsynningi. Er ættin tvørtur um sundið, er vindurin ójavnari og hvirlurnar harðari á vesturættunum enn av eysturættunum.*

# Veðrið í bygdini

Yvirhøvur er bygdin gott veðurpláss, tó kann onkur ættin vera ógvuliga keðilig. Liggjandi við eitt smalt sund við høgum fjøllum á báðum síðum – serliga eru fjøllini á Kunoynni høg – og bert lítil broyting í luftrákinum yvir Føroyar kann broyta veðrið nógv í Haraldssundi.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í bygdini, setti undirritaði seg í samband við brøðurnar úr Haraldssundi Jákup Jacobsen (**JJ**) og Jógvan Paula í Kongsstovu (**JPíK**).

Við til samrøðuna í fundarhølinum hjá Veðurstovu Føroyar, sum eru á Sjónámi í Klaksvík, hevði eg spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar. Nógvar av millumættunum hava sama veður við sær, sum heil- ella hálvættin beint við.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 3: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Á norði fer vindurin suður ígjøgnum sundið. Vindurin er javnur og vindferðin tann sama sum fyri landið.

Viðvíkjandi avfalli, er tað tað sama sum fyri landið. Mjørki kann vera norðuri í sundinum um summarið, men tað røkkur ikki suður til bygdina.

Norðan er ikki skaðaætt.



*Mynd 4: Myndin tikin norður ígjøgnum Haraldssund. Tá ið ættin er norðan, er javnur vindur suður ígjøgnum sundið. Vindferðin er tað sama sum fyri landið. Norðan er ikki ein vát ætt, tað regnar sum fyri landið. Mjørki kann vera norðuri í sundinum, men røkkur ikki suður til bygdina. Norðan er ikki skaðaætt.*

## Landnyrðingur norðan

Veðrið á landnyrðingi er eitt bland av veðrinum sum er á norði og landnyrðingi.



*Mynd 5: Veðrið í Haraldssundi á landnyrðingi norði er eitt bland av veðrinum, sum er á norði og landnyrðingi.*

## Landnyrðingur



*Mynd 6: Myndin tikin av bygdini í Haraldssundi úr landnyrðingi. Hetta er besta ættin í bygdini. Vindurin er javnur, og vindurin er nógv minni enn miðalvindurin fyri landið. Hann merkist ikki fyrr enn vindferðin er komin upp í 15 til 20 m/s. Ættin er ikki vát, tó kunnu vera ælingar í henni. Ikki mjørkaætt.*

## Landnyrðingur eystan

Veðrið á landnyrðingi eystri líkist veðrinum á eystri.



*Mynd 7: Veðrið í Haraldssundi á landnyrðingi eystri er sum veðrið, tá ið ættin er eystan. Hann kemur úr Svartadali yvir um sundið.*

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, slær vindurin ímóti Galvskorafjalli og fer yvir aftur ímóti Borðoynni.

Vindurin er fyri tað mesta javnur, og vindferðin er heldur minni enn sagt fyri landið.

Á eysturætt kann regna, og kavi legst, tá ið tað er lítil vindur.

Um summarið kann vera mjørki – yvirhøvur er eystan mjørkaætt í góðum veðri.

Eystan er roknað sum ein góð ætt.



*Mynd 8: Myndin tikin av Haraldssundi av eystri. Á hesari ættini slær vindurin ímóti Galvskorafjalli og fer yviraftur ímóti Borðoynni. Vindurin er javnur, og vindferðin eitt sindur minni enn sagt fyri landið. Ættin kann vera vát, er lítil vindur á vetri, legst kavi viðhvørt. Eystan er mjørkaætt í Haraldssundi í góðum veðri. Í Haraldssundi rokna tey eystan sum eina góða ætt.*

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri er sum á landsynningi.

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, kemur lotið norður ígjøgnum sundið, rakar bygdina og snarar 90 stig og fer yvir ímóti Sandvíkum.

Vindurin er nakað tað sama, sum miðalvindurin er fyri landið.

Tað er ofta vátt á ættini, og mjørki kann koma norður úr Ánunum. Tá er tað klárari norðundan, t.e. frá bygdini og norðureftir. Norðuri á Skarði er klárt, tey kunnu fara á fjall har norðuri.

Landsynningur er ikki nøkur ring ætt. Einki serligt er við henni, gott ella ringt. Hon slær ímóti fjallinum og fer omanav.



*Mynd 9: Myndin tikin ímóti útsynningi suðuri. Tá ið ættin er landsynningur, kemur lotið norðurígjøgnum sundið, rakar bygdina og snarar 90° og fer yvir ímóti Sandvíkum. Einki serlig er við ættini, hon slær ímóti fjallinum og fer omanav. Vindurin er ójavnur, og vindferðin er sum miðalvindurin fyri landið. Landsynningur er ein vát ætt, og mjørki kann eisini vera. Hann kemur norður úr Ánunum. Tá er klárari norðundan, t.e. frá bygdini og norðureftir. Á Skarði er klárt. Landsynningur er ikki ein ring ætt.*

## Landsynningur sunnan

Veðrið á landsynningi suðuri líkist veðrinum á landsynningi.

## Sunnan

Tá ið tað er suðurætt, fer vindurin norður ígjøgnum sundið. Ikki nógvur vindur í bygdini, men úti á sundinum er meiri vindur.

Vindurin er javnur, og vindferðin er minni enn miðal fyri landið.

Tað kann vera rættiliga vátt á ættini og eisini mjørki norður úr Ánunum – tó klárari norðundan.

Sunnan er ein góð ætt í Haraldssundi.



*Mynd 10: Myndin tikin norður ígjøgnum Haraldssund.  Tá ið ættin er sunnan, fer sindurin norður ígjøgnum sundið. Tað er ikki nógvur vindur í bygdini, men á sundinum er meiri vindur. Vindurin er javnur, og vindferðin eitt sindur minni enn miðal fyri landið. Ættin kann vera rættiliga vát, og mjørki kann koma norður úr Ánunum. Tá er klárari norðundan. Sunnan er ein góð ætt í Haraldssundi.*

## Útsynningur sunnan

Veðrið á útsynningi suðuri líkist veðrinum á suðuri, tó heldur turrari og ikki so javnur.

## Útsynningur

Tá ið ættin er útsynningur, slær vindurin ímóti Snæfelli á Borðoynni og fer ímóti Knúki á Kunoynni, sum er norðan fyri bygdina í Haraldssundi. Áirnar av niðasta hjallanum (*Garðáirnar*) rúka uppeftir.

Vindurin er javnur, og vindferðin er tann sama sum miðalvindurin fyri alt landið.

Útsynningur er ein turr ætt í Haraldssundi – góð terraætt.

Ein miðalgóð ætt.



*Mynd 11: Myndin er tikin ímóti landsynningi. Tá ið ættin er útsynningur, slær vindurin ímóti Snæfelli á Borðoynni og fer úr landsynningi ímóti Knúki, sum er norðan fyri bygdina í Haraldssundi. Er nógvur vindur, rúka Garðáirnar uppeftir, sum eru av niðasta hjallanum. Vindurin er javnur á útsynningi, og vindferðin tann sama sum fyri landið. Ættin er turr, góð terraætt. Í Haraldssundi siga tey ættina vera miðalgóða.*

## Útsynningur vestan

Tá ið ættin er útsynningur vestan, kemur hann undan Brattanesi, slær bæði ímóti Lokka og Snæfelli á Borðoynni og fer yvir um sundið. Garðáirnar rúka allar uppeftir – ikki bert á niðasta hjallanum, men eisini uppi á Fossum.

Vindurin er ógvuliga ójavnur við nógvum hørðum hvirlum. Ringasta ættin í bygdini, stór skaðaætt. Illveður var 14. januar 1989 við nógvum skaðum. Ættin var útsynningur vestan.

Vindferðin er størri enn miðalvindferðin fyri alt landið. Hvirlurnar eru harðar, líkist illveðri á Norðadalsskarði.

Í góðum veðri er ættin góð summarætt – terraætt. Hon er ikki ein vát ætt.

Tað er ikki mjørki á útsynningi vestri.



*Mynd 12: Útsynningur vestan er ringasta ættin í Haraldssundi. Allar áirnar norðan fyri bygdina (Garðáirnar) og uppi á Fossum rúka, tá ið tað er nógvur vindur. Vindurin kann vera rættiliga ójavnur við nógvum hørðum hvirlum. Skaðaætt. Vindferðin er nógv meiri enn miðal fyri landið. Í góðveðri um summarið er góður terri á ættini. Mjørki er ikki á útsynningi vestri.*

## Vestan

Tá ið ættin er vestan, kann hann liggja báðar vegir – t.e. bæði omanav men eisini inn ímóti bygdini, tí vindurin slær ímóti Lokka. Stórur munur er á veðrinum í Haraldssundi á beinari vesturætt og útsynningi vestri.

Vindurin er ójavnur, men ættin liggur sjáldan leingi. Vanliga er ættin *beinur* vestan bert eina løtu, meðan ættin hækkar.

Vindferðin er heldur minni enn miðal fyri landið á vesturætt, og hon er ein hampuliga turr ætt.

Vestan er ikki mjørkaætt og er roknað sum ein góð ætt í Haraldssundi.



*Mynd 13: Myndin tikin úr vestri. Tá ið ættin er vestan, kann vindurin liggja báðar vegir – t.e. bæði omanav og inn ímóti bygdini, tí vindurin slær ímóti Lokka á Borðoynni. Stórur munur er á veðrinum í Haraldssundi á beinari vesturætt og á útsynningi vestri. Vindurin er ójavnur. Vanliga liggur vesturættin ikki leingi, bert løtuna meðan hann hækkar t.d. úr útsynningi vestri upp í útnyrðing. Vindferðin er heldur minni enn miðalvindurin fyri landið, og ættin er turr. Mjørki er ikki á vestri, og ættin er roknað sum ein góð ætt í Haraldssundi.*

## Útnyrðingur vestan

Ættin liggur inn á bygdina. Fyrst slær hon ímóti Borðoynni, áðrenn hon kemur yvir um sundið aftur.

Vindurin er javnur á útnyrðingi vestri, og vindferðin er tann sama sum fyri landið.

Ættin er ikki vát ella mjørkaætt og er roknað sum ein hampuliga góð ætt í Haraldssundi.

## Útnyrðingur

Ættin strekkir ikki sundið, men slær ímóti Borðoynni á veg suðureftir.

Vindurin er hóast tað javnur, og vindferðin tann sama sum fyri landið, men norðuri á sundinum er meiri vindur.

Útnyrðingur er ikki ein vát ætt ella mjørkaætt.

Hetta er ein hampulig ætt, tó runar tað meira enn á hinum ættunum. Tó er ikki brim. Haraldssund er ikki brimpláss.



*Mynd 14: Útnyrðingur strekkir ikki sundið, men slær ímóti Borðoynni á veg suðureftir og kemur til bygdar sum av landnyrðingi. Vindurin er javnur, og vindferðin er tann sama sum fyri landið. Ættin er ikki vát ella mjørkaætt. Í Haraldssundi siga tey ættina vera eina hampuliga góð ætt, tó at tað runar meira enn á hinum ættunum.*

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum, tá ið ættin er norðan.



*Mynd 15: Tá ið ættin er útnyrðingur norðan, líkist veðrið í Haraldssundi veðrinum, tá ið ættin er norðan.*